# REIÐARAFELAGIÐ FYRI HANDILSKIP

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

*Skal sendast til:*
**Reiðarafelagið fyri Handilskip**
**Box 1038**
**110 Tórshavn** ***ella*** **industry@industry.fo**

## Upplýsingar um virkið:

| | |
|---|---|
| **Fyritøka:** | |
| **Adressa:** | **Postboks:** |
| **Postnr:** | **Bygd/býur:** |
| **Tlf/fartelefon:** | **Fax:** |
| **t-post fyritøka:** | **Heimasíða** |
| **Stjóri/ábyrgdarhavari:** | **V-tal:** |
| **t-post stjóri/ábyrgdarhavari:** | |
| **Skip (navn og stødd í BRT og kW):** | |

**Tal av starvsfólki tilsamans:**______
Býtt út á:
**Á sjónum**: Navigatørar:____ Maskinmeistarar:____ Dekkarar:____ Annað:____
**Á landi**: Arbeiðarar:____ Handverkarar:____ Skrivstovufólk:____ Lærlingar:____
Teknikarar:____ Akademikarar:____ Onnur:____

Ynskja tit at móttaka **tíðindabræv** frá Vinnuhúsinum: ja ☐ nei ☐

Ynskja tit at verða skrásett í okkara **Útflutningskrá**:[1] ja ☐ nei ☐

☐ Set X og vátta at hava lisið og góðkent viðgerð av persónsupplýsingum, sum lýst í viðløgdum skjali.

Vit melda okkum við hesum í Reiðarafelagið fyri Farmaskip og vátta samstundis at hava lisið og góðtikið lógir felagsins og at móttaka kunning frá felagnum og Vinnuhúsinum.

Staður: Dagfesting: / -

Undirskrift og stempul

[1] Les um útflutningsskrá á www.industry.fo

# Viðgerð av persónsupplýsingum

Her verður kunnað um, hvussu persónupplýsingar verða nýttar í sambandi við, at tykkara fyritøka er limur í einum av arbeiðsgevarafeløgunum ella vinnugreinafeløgunum í Vinnuhúsinum og tykkara rættindi í hesum sambandi.

## 1. Dátuábyrgdari

Føroya Arbeiðsgevarafelag er dátuábyrgdari fyri viðgerð av persónsupplýsingum í sambandi við limaskapin hjá fyritøkuni í feløgunum í Vinnuhúsinum.

Tú kanst seta teg í samband við Vinnuhúsið soleiðis:

**Vinnuhúsið**
Óðinshædd 7
100 Tórshavn
Føroyar
+298 30 99 00
industry@industry.fo

## 2. Endamálið við viðgerðini av persónupplýsingum

Endamálið við viðgerðini av persónupplýsingum hjá feløgunum í Vinnuhúsinum er at gera tað møguligt at røkja tær skyldur, sum feløgini hava sambært viðtøkum hjá feløgunum á nøktandi hátt.

Feløgini í Vinnuhúsinum hava tørv á at viðgera persónupplýsingar sambært:

- Viðtøkum ella lógum fyri feløgini, sí www.industry.fo

## 3. Hvørjar persónupplýsingar viðgera feløgini í Vinnuhúsinum

Tá ein fyritøka meldar seg inn í ella er limur í einum av feløgunum í Vinnuhúsinum, verður samstundis givið okkum rætt at viðgera persónsupplýsingar, sum eru viðkomandi fyri limaskapin. Við teimum vissa vit okkum um, at vit kunnu seta okkum í samband við rætta viðkomandi í limafyritøkuni. Hetta er neyðugt fyri, at vit kunnu halda okkara skyldur í sambandi við limaskapin.

Hesar persónsupplýsingar skráseta vit:

- Navn á fyritøku
- Navn á leiðslupersónum
- Teldupostadressa
- Fartelefonnummar

Tá fyritøka meldar seg inn í eitt av feløgunum í Vinnuhúsinum, gevur tú samtykki til, at felagið kann:

- Skráseta navn, starv, telefonnr. og teldupostadressu

Tá eitt av feløgunum í Vinnuhúsinum setir seg í samband við teg, brúka vit hesar persónupplýsingar:

- Navn
- Teldupostadressa
- Telefonnummar

Tá feløgini í Vinnuhúsinum venda sær til fyritøkuna ella fyritøkan vendir sær til okkara, verður samskifti av týdningi skrásett í okkara skjalaskipan:

- Navn á limafyritøku
- Navn á persóni
- Nær samskifti er farið fram
- Hvat samskifti talan er um

Endamálið er at skjalfesta samskifti, sum hevur týdning fyri tulking av málum, sum feløgini varða av, skjalfesting av ráðgevingini, sum veitt verður frá feløgunum í Vinnuhúsinum, skjalfesting av avgerðum og fráboðanum.

## 4. Persónupplýsingar, ið verða sendar til tænastuveitarar

Feløgini í Vinnuhúsinum brúka skipanirnar hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag, til at avgreiða øll formlig viðurskifti, viðvíkjandi limaskapi, limagjaldi, avgreiðslu av fyrispurningum við meira. Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur avtalu við triðjapart um hýsing av KT-skipanum.

## 5. Hvussu leingi goyma feløgini í Vinnuhúsinum persónupplýsingar

Eftir at ein fyritøka hevur meldað seg úr einum av feløgunum í Vinnuhúsinum, verða persónupplýsingar goymdir í tvey ár. Tá verða upplýsingarnar strikaðar. Talan er um persónupplýsingar, sum eru upplýstar feløgunum í Vinnuhúsinum, meðan fyritøkan hevur verið limur.

## 6. Rættindi

Ein og hvør hevur sambært galdandi lóggávu ymisk rættindi í sambandi við viðgerð av persónupplýsingum.

Set teg í samband við felagið í Vinnuhúsinum tú er limur í, um tú ynskir at brúka tíni rættindi. Hetta kann t.d. vera:

- Hvørjar persónupplýsingar verða viðgjørdar
- At rætta skeivar upplýsingar
- Í ávísum førum kanst tú fáa tínar persónupplýsingar strikaðar innan freistina ásett í pkt. 5 omanfyri.

Til ber at kunna seg nærri um rættindi sambært persónupplýsingarlóggávuni á heimasíðuni hjá Dátueftirlitinum, www.dat.fo.

## 7. Klagur

Til ber at klaga til Dátueftirlitið um viðgerð av persónupplýsingum. Sí heimasíðuna www.dat.fo.